VIÐMERKINGAR

# Týdningurin av einari (tínari) atkvøðu



VAL05

**Jenis av Rana**

Á fundi í samkomu í USA fyri nøkrum árum síðani, vórðu hesi bæði dømini um týdningin av einari atkvøðu borin fram. Í royndum sínum at fáa samkomufólk at fara á val, segði pastorurin frá, hvussu tað bar so til, at amerikanska fólkið valdi at tosa enskt og ikki týskt, og um hvussu Adolf Hitler kom til valdið í nazistaflokkinum.

Bert ein atkvøða- segði pastorurin- tryggjaði Hitler valdið, og bert ein atkvøða í yvirvág gjørdi at enskt varð valt framum týskt sum tjóðarmál amerikumanna.

Hevði bert ein veljari valt øðrvísi, ella siti heima, høvdu amerikumenn kanska tosa týskt í dag- og sorgarleikurin við Hitler hevði kanska verið ókendur, um bert ein flokslimur hevði atkvøtt øðrvísi hin lagnutunga dagin.

Ein áheitan á teg, sum er glaður fyri tað arbeiði, sum Miðflokkurin ger á løgtingi í dag.

Eitt er at fáa umboð valt á Fólkating, annað er at fáa flokkin styrktan gjøgnum valið. Til tað krevst hvør atkvøða, og her er møguleikan hjá tær at hjálpa. Tí heita vit á teg um ikki at sita heima, men sjálvur fara á val, og fá onkran við tær- so valið gerst eitt Miðflokkaval.

# Vel eina virðiliga og virkna javnaðarrødd á fólkating



VAL05

**Elin Heðinsdóttir Joensen**
*fólkatingsvalevni Javnaðarfloksins*

Týsdagin hevur tað alstóran týdning, at Føroyar velja virðilig og virkin umboð til fólkatingið, tí hesi komandi árini eru sera týdningarmikil fyri okkara viðurskifti — bæði í ríkisfelagsskapinum og altjóða samfelagnum yvirhøvur.

Javnaðarflokkurin læsir seg ikki fastan í, at ríkisfelagsskapurin skal vera tann sami í allar ævir, tí tað í sjálvum sær hevur einki endamál. Hinvegin vilja vit brúka henda felagsskap sum eitt amboð, ið alsamt skapar menning og møguleikar, so tað verður liviligt hjá øllum í landi okkara.

At sita á fólkatingi snýr seg ikki um at markera seg fyri einhvønn prís ella at draga føroyskar ósemjur við sær niður til Danmarkar. Tvørturímóti er fremsta uppgávan hjá okkara fólkatingsumboðum, at tey duga at finna breiðar semjur, so úrslit kunnu fáast burturúr.

Tað er lætt at seta fram eina ørgrynni av fyrispurningum ella reisa ein hóp av málum, men hevur tað einki endamál, sum er til beinleiðis gagns fyri Føroyar og føroyingar, er tað til onga nyttu. Her snýr tað seg ikki um nøgd, men um dygd, og skal nakað veruliga síggjast aftur, er Javnaðarflokkurin besta boðið, nú tú við tíni atkvøðu skalt velja føroyskt umboð á fólkating.

Tí hevur tað stóran týdning, at tú velur eina rødd á fólkating, ið er før fyri at umboða føroyingar á virðiligan hátt, so ávirkan fæst á alt tað, sum hevur týdning fyri Føroyar og føroyingar. Til tað er eingin betri enn eitt umboð frá Javnaðarflokkinum, ið eisini á fólkatingi vil arbeiða fyri tí besta fyri Føroya land og Føroya fólk.

# ES og fiskivinnupolitikkur



VAL05

**Heini O. Heinesen**
*fyrrv. løgtingsmaður*
*http://heima.olivant.fo/~hoyh/*

Støðan í dag er tann, at Sambansflokkurin berjist sum úlvur á skóð fyri at innlima Føroya land inn í ES sum danskan ríkislut. Teir vilja eisini fyri einhvønn prís fáa føroya fólk at frásiga sær frumburðarættin til sítt egna føðiland, og harvið avreiða okkara sjálvsagda rætt, at umsita okkara egna fiskiríkidømi, um teir fáa magt, sum teir hava agt.

Upp móti hesum armóðs politikki, setur Tjóðveldisflokkurin stevnu sína.

Hvat var tað, sum gjørdi at okkara samfelag reisti seg aftur aftana kreppuna?

Tað var fyrst og fremst tann stovnsrøktarpolitikkur sum tjóðveldisflokkurin stóð fyri, saman við táverandi samgonguflokkum, sum kom í gildi í 1993/94, beint ímóti harraboðum úr ES landinum Danmark.

Økisfriðingarnar komu í gildi 6. januar 1994, lógin "um vinnuligan fiskiskap kom í gildi 10. mars sama ár.

Tað var hesin stovnsrøktarpolitikkur sum gjørdi at okkara land reisti seg aftur úr øskuni.

Hetta kundi bert lata gera, tí at hesin okkara sjávsagdi rættur ikki tá var avreiddir til ES. Tað er hesin rættir sum nú skal avreiðast til ES.

Tjóðveldisflokkurin bjóðar seg aftur fram at møta á danatingi aftaná valið, eisini tí vit vilja halda fast um rættin sjálvir, at stýra okkara fiskivinnupolitikki.

Við hesu hugsjón sum grundarlag er tjóðveldisflokkurin til reiðar til samstarva.

Tað er einum og hvørjum greitt, at tjóðveldisflokkurin er besta boðið upp á at verja okkara fiskiríkidømi.

Tað hevur hann prógvað ferð eftir ferð, síðan hann var stovnaður, við stuðli frá fiskimonnum.

Hetta vilja vit eisini gera á fólkatingi, um tað gerst neyðugt.

Allir hinir flokkarnir hava eina jánkasliga støðu til tað, sum rørir seg við at Danmark ætlar at avreiða sín avgerðarrætt á hesum øki til ES.

Tjóðveldisflokkurin er einasti flokkur, sum hevur víst í verki, at vit ikki geva okkum, sjálvt um hart leikar á, og tað brýtur í bæði borð.

Valdagin hevur tú møguleikan at geva tína atkvøðu til tað valevni sum hevur lagt navn til tann besta fiskivinnufolitikkin aftaná kreppuna.

# Betri samljóð, sterkari samanhald, størri sjálvræði - við Javnaðarflokkinum



VAL05

**Hans Pauli Strøm**
*valevni Javnaðarfloksins*

Føroyingar drógu í allar ættir. Hvør stóð móti øðrum. Ósemjur og stríð um mál og mið. Hetta var politiska støðan í landinum, inntil fyri einum árum síðani. Tá tók Javnaðarflokkurin við landsins leiðslu og skipaði samgongu við Sambandsflokkin og Fólkaflokkin. Rumbulsmakararnir í Tjóðveldisflokkinum vórðu settir til viks. Vit fingu eina savnandi samgongu, ið virkar fyri betri samljóði og sterkari samanhaldi í føroyska fólkinum, um tær stóru avbjóðingarnar at reisa okkara land og vinna okkum størri sjálvræði.

Tað vísir seg aftur nú, at Javnaðarflokkurin skal taka um politiska stýrisvølin, skal vend koma í. Hinir megna tað ikki. Tak bara gongdina síðstu 10 árini.

Eftir kreppuna fyrst í 90-unum var ikki bara neyðugt við eini vinnuligari endurreising, men eisini eini politiskari nýskapan, ikki minst í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark, sum vóru farin heilt út av lagi.

Men Sambandsflokkurin, sum sat við landsins leiðslu tey fyrstu árini eftir kreppuna, legði lok á og setti propp í fyri einumhvørjum politiskum dialogi og initiativi um ríkisrættarligu viðurskiftini. Úrslitið av hesum var, at tað fór at prutla og til síðst upp at kóka undir lokinum, so fullveldislandsstýrið sprakk úr pottinum í 1998.

Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin tóku við landsins leiðslu, og nú skuldi alt kollveltast millum Danmark og Føroyar. Teir fóru í politiskan bardaga móti ríkismyndugleikunum. Konfrontatiónir og proklamatiónir í staðin fyri dialog og samstarv.

Soleiðis gingu seks ár.

Úrslitaleys. Onki spurdist burtur úr. Bardagi innanborða og fullveldisskútan fór til botns.

Nú er vend komin í. Í eitt ár hevur Javnaðarflokkurin staðið á odda fyri fyri hesi breiðu samgongu, sum søkir semjur og samstarv um skilagóðar loysnir, eisini í viðurskiftunum við Danmark og útheimin annars. Ein samgonga við trimum flokkum, sera ólíkir á nógvum økjum, men sum arbeiða sera væl saman, onki rumbul, men realpolitikkur fyri gagnligum úrslitum.

Javnaðarflokkurin hevur evnini at skipa og leiða hetta samstarvið.

Javnaðarflokkurin hevur eisini evnini at umboða okkum á Fólkatingi á ein slíkan hátt, at vit sum skjótast aftur fáa tað góða samstarvið millum føroyingar og danir.

Tí er so umráðandi, at tú stuðlar Javnaðarflokkinum at vinna annað føroyska umboðið á Fólkatingi.

# Góðu føroyingar



VAL05

**Jógvan á Lakjuni**
*landsstýrismaður og valevni Fólkafloksins*

Vit liva í einum sera broytiligum heimi, og hetta, sum verður nevnt globalisering ella altjóðagerð, er ein veruleiki, sum vit merkja meira og meira hvønn dag, sum gongur.

Fjarstøða og landamørk missa sín týdning - ikki minst á tí handilsliga økinum - og vit kunnu samstarva og kappast við - og vit fáa eisini kapping frá allari verðini.

Hetta hevur veldigar avbjóðingar og eisini vansar við sær - og krøv - ikki minst fyri eina lítla tjóð sum okkara - bæði vinnuliga, mentanarliga og á annan hátt.

Men samstundis kann hetta geva okkum nýggjar og stórar møguleikar, um vit bera okkum rætt at og standa saman um tey røttu tingini.

Tað er umráðandi, at vit eru úti um okkum - at vit fylgja við og allastaðni nýta hvønn kjans at upplýsa og kunna onnur um okkara viðurskifti.

Her kunnu fólkatingssessirnir vera góðir, og verða teir rætt nýttir, kunnu teir hava sera stóran týdning fyri okkum - ikki minst í strevi okkara fyri størri uttanríkispolitiskum heimildum og sjálvræði.

Vit í Fólkaflokkinum bjóða okkum fram, og eg fari at heita á tykkum um at nýta tykkara atkvøðurætt. Farið á val og setið kross við Fólkaflokkin.